


## Farvæl til Vista og góðandag til Windows 7

Stýriskipanin skal avloysa Windows Vista. Tað greiddi ovasti stjórin í Microsoft, Steve Ballmer frá, tá hann á eini elektronikmessu í Las Vegas fortaldi, at longu í morgin verður ein royndarversjón av nýggju stýrisskipanini Windows 7 send í umferð kring allan heimin. – Vit eru stutt frá at levera ta besti útgávuna av Windows nakrantíð, sigur hann. Hann lovar, at tann nýggja stýrisskipanin verður einføld, trúlig og skjót. – Fríggjadagin vil beta-útgávan verða tøk kring allan heimin, soleiðs at brúkarar kunnu koma online og royndarkoyra Windows 7 heimanífrá, greiðir hann frá. Nógvir brúkarar hava verið sera ónøgdir við, hvussu Wimdows Vista koyrdi á teirra teldu, og stýrisskipanin, sum enn er sera nýggj, er ongantíð blivin tað stóra hittið frá Microsoft.

# Reiðmenn heiðraðu The

FØÐINGARDAGUR

*Orð og myndir:*
*Jan Müller*

Leygardagurin 20. desember var ikki sum einhvør annar leygardagur í tí Harrans ári 2008. Fyri øll tey, sum hava halgað reiðmentanini alt sítt frítíðarlív, var hesin dagurin nakað heilt serligt. Aksel Hansen, sum saman við øðrum góðum monnum, legði lunnar undir hesa serstøku mentan við at stovna Føroya Ríðingarfelag 25. februar í 1943, kundi henda kalda men vakra vetrardag halda sín 85 ára føðingardag – ikki á hestbaki men tó saman við fleiri enn fimti reiðfólkum úti í tí føroyska rossamekkainum, egna fjósi sínum úti í Havnardali. Aksel Hansen, ellisforsetin í føroyska rossaumhvørvinum, fekk nógv góð skoðsmál hesa løtuna: hann var ein teirra, sum legði grundarsteinin undir hesa serstøku mentan, hann er The grand old Man millum reiðfólk, og hann hevur verið fantastiskur og givið øllum teimum ungu, ið hava brúkt tíð og orku til hetta góða frítíðarítriv, íblástur.

Eitt stórt rossafylgi við Svenning Reinert og Merkinum á odda helt leiðina út í Havnardal, har ein fryntligur og góðsligur Aksel sjálvur tók ímóti. Har var boðið til gløgg í fjósinum, nøkur góð orð fullu, og hurrárópini rungaðu millum básarnar. Eftir tað var farið niðan í felagshølini til ein betri bita.

Tað er torført við orðum at lýsa slíka minniliga løtu, har kvinnur og menn, ung sum tilkomin seta hvørjum øðrum stevnu slíkan vetrardag undan jólum at heiðra The grand old Man í føroyskum rossahøpi, tí lata vit heldur myndirnar tala.





*Formaðurin í Føroya Ríðingarfelag, Hans Vilhelm Nielsen handar føðingardagsbarninum blómutyssi*



*Fimti reiðfólk við Svenning Reinert á odda løgdu leiðina út í Havnardal at heiðra ein av stovnarunum av Føroya Ríðingarfelag, Aksel Hansen*



*Reiðmenn heilsa føðingardagsbarninum*



